# Kurt á rætta staðnum

*Noreg: Sogndal spældi javnt móti gamla felagnum hjá Julian Johnsson*

Kurt Mørkøre skoraði annað av málunum hjá Sogndal, tá teir spældu javnleik móti Kongsvinger sunnudagin.

Dysturin móti gamla felagnum hjá Julian Johnsson, var á útivølli, og bæði Kurt og Julian vóru við á liðnum hjá Sogndal frá byrjan.

Sogndal kom á odda 1-0 í fyrra hálvleiki, men beint eftir steðgin javnaði Kongsvinger. Sogndal spældi væl í fyrra hálvleiki, og Kongsvinger, sum hevði funnið fýra av teimum fyrstu fimm dystunum, var undir trýsti ein stóran part av fyrra hálvleiki.

Í seinna hálvleiki kom Kongsvinger afturíaftur, men Sogndal helt fram við sínum góða spæli. Kurt Mørkøre legði Sogndal fram um 2-1, tá hann fylgdi upp, eftir at ein viðspælari hevði roynt seg við einum skoti. Stutt eftir málið varð Kurt útskiftur. Í fyrra hálvleiki var hann av vøllinum í nakrar minuttir, tí hann fekk ein snudd.

Tað eydnaðist Kongsvinger at javna til 2-2, og tað gjørdist úrslitið av dystinum.

Sogndal hevur nú 9 stig fyri seks dystir, og teir liggja omanfyri miðjuna á stigatalvuni. Næstu ferð skulu Kurt og Julian spæla móti Byåsen, sum eisini liggur nakað omanfyri miðjuna, og hesin dysturin verður á heimavøllinum hjá Sogndal næsta sunnudag.

**ek**

# Allan Mørkøre skoraði

***Ísland:** Fimm føroyskir spælarar spældu í sama dysti, og Allan Mørkøre skoraði fyri ÍBV*

Í Íslandi vóru fimm føroyskir spælarar á vøllinum, tá IA av Akranesi og Leiftur spældu fyrsta landskappingardystin á árinum.

Dysturin, sum varð spældur hósdagin, endaði við 1-0 sigri til Akranes.

Á liðnum hjá Leiftur vóru Jens Martin Knudsen, Jens Erik Rasmussen, Sámal Joensen og John Petersen.

Uni Arge var í álopinum hjá Akranesi, og hann spældi sera væl. Hann legði upp til málið hjá sínum liði, og hann hevði tvær góðar royndir, sum Jens Martin Knudsen bjargaði. Men Uni mátti av vøllinum beint fyri hálvleik eftir ein samanbrest við ein mótspælara.

### Hava bóltin meira

Í seinna hálvleiki hevði John Petersen, sum spældi sín fyrsta dyst í íslendskum fótbolti, tvær góðar royndir, men tað eydnaðist ikki Leiftri at fáa nakað mál.

Eftir dystin segði Jens Martin Knudsen við íslendskar fjølmiðlar, at hann var nøgdur við verjuspælið hjá sínum liði, men hann helt, at Leiftur skuldi arbeiða við at betra um spælið á miðvøllinum, so liðið hevði bóltin meira.

Íslendskir fjølmiðlar halda, at IA er eitt gott boð upp á meistaraskapin í ár, men teir meta tað sum eitt afturstig fyri liðið, um Uni Arge ikki kann spæla næstu vikurnar. Hann tóktist vera væl fyri í fyrsta dystinum.

### Allan skoraði

Allan Mørkøre skoraði eitt av málunum, tá ÍBV spældi ímóti Fylkir. Dysturin endaði við javnleiki 2-2, og Allan Mørkøre skoraði málið til 1-1.

ÍBV var á odda 2-1, men teir kláraðu ikki at halda fast um leiðsluna, og fyrsti dysturin hjá teimum endaði tí við javnleiki.

Allan Mørkøre skal í ár royna seg sum áleypara hjá ÍBV, og tað hevur higartil gingið væl. ÍBV hevur annars bara spælt við einum áleypara, men nú ætla teir at hava Allan Mørkøre heilt frammi eisini.

Allan Mørkøre hevur skotið nógv mál í dystunum, sum vóru spældir undan byrjanini í landskappingini, og í Íslandi verður tað mett sum ein styrkur fyri liðið, at Allan Mørkøre nú skal spæla í álopinum.

Spælast skuldi aftur í Íslandi longu í gjárkvøldið.

ek



*Allan Mørkøre, sum her sæst í HB búnanum, hevur rættulga fingið gongd á málskjótingina, nú hann er fluttur niðan í álopið hjá ÍBV*

# Uni Arge kann ikki spæla í seks vikur

***Ísland:** Tað, sum skuldi vera tað stóra árið hjá Una Arge, líkist nú meira einum skaðaári*



*- Bind frið í seks vikur. Somikið greið eru boðini til Una Arge, sum varð skaddur í føroysku uppgerðini í Íslandi*

EYÐUN KLAKSTEIN

Í 40 minuttir vísti føroyski álopsmaðurin, Uni Arge, at hann er so væl fyri sum sjáldan áður.

Hann var á liðnum hjá Akranesi, sum spældi fyrsta landskappingardystin móti Leiftri hósdagin, og í 40 minuttir var hann tann størsta hóttanin hjá Akranesi.

Men so endaði galið.

Ein bóltur varð sendur inn í brotsteigin hjá Leiftri, og Uni setti ferð á fyri at fáa fatur á bóltinum.

– Beint sum eg komi fram at bóltinum, fái eg eitt skump, sum eg als ikki eri klárur uppá, Eg fór og sendandi og lendi á økslini. Eg hoyrdi at okkurt fór, og har var einki at gera. Eg mátti gevast at spæla beinanvegin, greiðir Uni Arge frá. Hendingin fór fram einar fimm minuttir fyri hálvleikssteðgin.

Fríggjadagin varð Uni kannaður fyri skaðan, og eftir øllum at døma er eitt liðband farið í økslini, og av tí sama er óstbeinið fara eitt sindur av lagi.

– Eg havi fingið at vita, at eg kann rokna við, at fýra til seks vikur ganga, áðrenn eg veri førur fyri at spæla aftur, sigur Uni Arge.

### Vísti nógv

Íslendskir fjølmiðlar halda, at Uni stóð seg sera væl í dystinum fríggjadagin. Hann tóktist verða sera væl fyri, hann legði upp til sigursmálið hjá Akranesi, og hann hevði sjálvur tvær góðar royndir, sum Jens Martin Kundsen bjargaði.

– Uni Arge gav greiðar ábendingar um, at hetta kundi gerast eitt stórt ár hjá honum, sigur íslendski ítróttarblaðmaðurin, Viðir Sigurðsson, sum starvast á Morgunblaðnum.

– Tí var tað stórt spell, at hann fekk skaðan, og tað er avgjørt ein missur fyri Akranes, at Uni ikki fær spælt næstu dystirnar, sigur hann.

Talan verður helst um, at Uni ikki fær spælt einar sjey dystir.

– Hóast hetta er eitt stórt bakkast fyri meg, kann eg í hvussu so er ugga meg við, at einki er hent beinunum, og tí kann eg, eftir at ringasta pínan hevur lagt seg, fara undir at venja aftur, sigur Uni Arge.

– Eg fái sjálvandi ikki spælt fótbólt næstu vikurnar, tí økslin tolir tað ikki, men eg fái runnið og hildið meg so frætt í form, sum tað ber til, tá tú ikki kanst spæla dystir.

### Kann venja

Uni Arge heldur sjálvur, at hann var sera væl fyri, nú íslendska kappingin byrjaði.

– Eg havi vant miðvíst síðani februar mánaði. Fyrst í HB, og síðani á Akranesi, eftir at eg kom yvir her. Og sjálvsálitið var eisini gott undan fyrsta dystinum. Eg ivaðist ikki í, at vit fóru at vinna og at fór at gera okkurt mál, men so hendi hetta. Tað kemur illa við, sigur hann.

– Men nú veri eg noyddur at fáa sum mest burtur úr, meðan eg gangi skaddur, og eg vóni at spæla aftur fyri Akranes um einar seks vikur, sigur hann.

Akranes verður mett at verða millum favorittarnar til íslendska meistaraskapin, og teir koma eftir øllum at døma at kappast móti ÍBV við Allani Mørkøre og KR.

Men næstu seks vikurnar skal liðið klára seg uttan sín føroyska álopsmann.





*Áki Olsen sæst her í dysti móti VÍF í fjør, men komandi ár verður hann aftur at síggja í VÍF búnanum*

# Aftur til Vestmanna

*Áki Olsen, sum fyri stuttum gjørdist føroyameistari við Neistanum, hevur nú boðað frá, at hann verður aftur hjá barndómsfelagnum, VÍF komandi kappingarár*

JÁKUP MØRK

Í farnu viku frættist, at Áki Olsen hevur gjørt av at fara aftur til barndómsfelagið, VÍF.

Í fjør var hann annars partur av gullvinnarunum úr Neistanum, har hann saman við Heina Joensen stóð fyri stórum parti av neistamálunum.

### Ikki favorittar

Hjalmar Klein Olsen, sum er venjari hjá VÍF, sigur við Sosialin, at teir sjálvandi eru fegnir um, at Áki nú aftur verður í parti við teimum.

- Størsti trupulleikin hjá okkum í fjør var uttan iva, at vit ikki høvdu nóg góðar bakspælarar, og her verður Áki sjálvandi ein risastórur styrkur, sigur Hjalmar.

- Ikki tí, fleiri ungir leikarar fingu møguleikan á liðnum, og teir hava avgjørt eisini góð evni, men helt á hædd við Áka eru teir ikki.

Spurdur um tilgongdin ger VÍF til stórfavoritt undan komandi kappingarári, svarar Hjalmar, at tað heldur hann ikki.

Sjálvandi skuldi hetta viðført, at vit nú eru væl sterkari, enn í fjør, men hinvegin veldst favorittheitið eisini um, hvat hini feløgini velja at gera, heldur hann fyri.

- Okkurt hevur verið at hoyt um, at fleiri av hinum liðunum ætla at styrkja seg við útlendskum leikarum, so enn haldi eg ikki at man kann tosa um nakran favoritt.

### Einki avgjørt

Tá hann sigur »okkurt av hinum liðunum« er nærliggjandi at hugsa um serliga Neistan, sum umframt at missa Áka Olsen, helst eisini má vera Heina Joensen fyri uttan komandi kappingarár.

Heini hevur áður havt í kvittanini at fara undir lestur uttanlands, og uttan teir báðar stórskjúttarnar, sum í landskappingini stóðu fyri 377 av Neistamálunum, kann Neistin helst ikki metast sum nakað seriøst boð upp á gullmerkini komandi kappingarár.

Úr Neistanum eru boðini tó í fyrstu atløgu, at enn er eingin avger tikin í so máta.

Enn er somikið stutt frá-li-ið, síðani boðini komu frá Áka, og sum skilst, so var avrát frammanundan, at hetta fyrst skuldi fáast upp á pláss.

Viðvíkjandi Heina, so hevur hann enn ikki gjørt endaliga av, um hann fer uttanlands, men sjálvandi er tað nakað sum merkist, um Neistin missur bæði Heina og Áka.

Sostatt hava føroyameistararnir enn ikki avgjørt, hvussu teir ætla at viga upp móti missinum av Áka, men tað kann helst uttan stórvegis iva staðfestast, at talan er um ein av týdningarmestu leikarunnum frá í fjør, sum nú er farin úr felagnum.

# Menninir á Malta

*Í morgin fer føroyska manslandsliðið í flogbólti undir fyrsta dystin í EM-undankappingini á Malta*

JÁKUP MØRK

Seinastu dagarnir hava menninir á føroyska a-landsliðinum í flogbólti verið á venjingarlegu í Danmark, har teir hava fyrireika seg til EM-undankappingina, sum verður hildin á Malta.

### Nýggj mótstøðulið

Fyrstu dysturin hjá Føroyum verður móti Wales, og verður hann leiktur í morgin, mikudagin.

Hini liðni í bólkinum eru Skotlands, San Marino og Malta.

Føroyar hava áður vunnið á Malta, meðan tað ikki hevur eydnast at vunnið á San Marino.

Wales og Skotland eru nýggj mótstøðulond í flogbóltshøpi.

Á venjingarleguni hevur føroyska liðið leikt nakrar venjingardystir, og tann seinasta av hesum, móti Bæverskov, vann føroyska liðið 3-2.

Venjari hjá Føroyum er rumenski fleyr venjarin, Pasco Romico, meðan Ingvard Eiriksson er hjálparvenjari.

Føroyski hópurin telur 11 mans, og eru hesir:

| | | |
|---|---|---|
| Ragnar Petersen | Fram | Kantur |
| Sigmund av Teigum | ÍF-Føroyar | Kantur |
| Rasmus Madsen | Fleyr | Kantur |
| Heini Weihe | ÍF-Føroyar | Miðja |
| Rúni Wihe | Fram | Kantur |
| Suni Hansen | SÍ | Miðja |
| Jan Hentze | Fleyr | Kantur |
| Bárður B. Mikkelsen | Fleyr | Hevari |
| Jákup W. Sivertsen | Fort. Odensen | Hevari |
| Annfinn Joensen | ÍF-Føroyar | Kantur |
| Steinar Eirikstoft | Fleyr | Miðja |




# Nýggjur leikari til B36

*Leiðslan í B36 arbeiðir í løtuni við at fáa enskan leikara til Føroya at spæla*

JÁKUP MØRK

Hóast B36 vann fyrsta landskappingardystin uttan John Petersen, so er ikki líkt til, at leiðslan ætlar at sita hendur í favn, nú ein hin týdningarmesti leikarin á liðnum ikki er tøkur longur.

### Enskur unglingi

Um vikuskiftið frættist, at ein enskur leikari skal vera ávegis til B36, og formaður felagsins, Kristian á Neystabø váttar, at tað er nakað um tosið.

Talan er um ein blaðungan leikara, Nathan Haslan, sum í dag spælir á unglingaliðnum hjá Sheffield Wednesday, sum júst er flutt niður úr ensku Premier League.

Enn er eingin avtala gjørd partanna millum, men eftir ætlan kemur onglendingurin til Føroya ein av fyrstu døgunum, har hann so í fyrstu atløgu skal royndarvenja við B36.

Verða dygdir hansara mettar at vera nóg góðar, er so ætlanin at gera sáttmála við leikaran.

B36 formaðurin leggur dent á, at verður talan um sáttmála, skal hesin vera longri enn til august mánað, tá enska kappingin aftur ferð av barakastokki.

### Hava hugsað seg um

Kristian á Neystabø sigur annars, at ætlaði styrkurin úr Onglandi sjálvandi hongur saman við frágongdini av John Petersen.

- Tá tú missir ein slíkan leikara, so er klárt at tú hugsar teg meira enn eina ferð, um tí hóast vit vunnu dystin á Sandi, og hóast vit eru væl nøgdir við avrikini hjá ungu leikarunum, so er einki at taka seg aftur í, at John hevði stóran týdning á liðnum, sigur Kristian á Neystabø.

Víðari sigur hann, at nýggi leikaran, eins og John Petersen, er ein framrættaður leikari, og vóna teir at hann eisini megnar at taka sessin yvir eftir landsliðsleikaranum.

Í løtuni er hesin spurningur tó ósvaraður, men væntandi fæst greiða á hesum ein av fyrstkomandi døgunum.



*Kristian á Neystabø, formaður í B36*